# Anastacia: Hetta er ein neyðug sending

**Støði á tónleikakappingum í sjonvarpi er so lágt, at "A Cut" er ein neyðug sending sigur Anastacia í samrøðu við Reuters**

TÓNLEIKAKAPPING
*Niels Uni Dam*

Anastacia gjørdist kend, tá hon luttók í sjónvarpskappingini "The Cut" í 1998. Síðan tá hevur hon selt 20 milliónir fløgur, og er vorðin ein sonn stjørna serliga í Evropa.

Ein tónleikaframleiðari sá songkvinnuna í sjónvarpinum og setti seg í samband við hana. Í sendingini "A Cut", roynir Anastacia at geva ungum bólkum sama møguleika.

Hon sigur við Reuters, at sjónvarpskappingar í tónleiki, sum heild eru á sera lágum støði. Her er ikki talan um tónleikarar, ella fólk úr tónleikaídnaðinum, sum vilja skapa tónleik. Men um sjónvarpsfólk, sum vilja gera sendingar. Tey sum luttakað eru heldur ikki veruligir tónleikarar, men vanlig fólk, sum síggja hetta, sum ein møguleika at gerast kendur.

A cut er ein roynd at gera eina annarleiðis tónleikakapping. Her er talan um veruligar bólkar, sum hava egin løg, og sum ikki eru skaptir til hetta endamálið. Hetta er sambært Anastaciu ein neyðug sending.

Vinnandi bólkurin sleppur at hita upp fyri Anastaciu framman fyri 35.000 fólkum. Eisini fáa allir luttakandi bólkarsama møguleika, sum Anastacia fekk, at spæla í sjónvarpi. Kanska onkur tónleikarframleiðari hoyrir bólkin, og dámar tað hann hoyrir..



*Anastacia vil skapa eina góða tónleikakapping*

# The Dreams nærri dreyminum

**Fyrsta A Cut sendingin á MTV, har føroysku punkararnir í The Dreams kappast við 9 bólkar um møguleikan at hita upp fyri Anastaciu, varð send mánadagin. Tveir bólkar vórðu sendir heim, men The Dreams kom víðari. Vit hava tosað við Hans Edward sangara í The Dreams, um hvussu tað var at síggj seg sjálvan í MTV, og hvussu hann upplivdi fyrstu dagarnar í MTV**

TÓNLEIKAKAPPING
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hans Edward sigur, at tað ikki ordiliga gekk upp fyri honum, hvussu væl tað hevði gingið hjá teimum, fyrr enn hann sá sendingina og sá, hvussu nógvir góðir bólkar høvdu roynt at sloppið við. Dómarar í kappingini eru amerikanska songkvinnan Anastacia og Olivier Behzadi, sum júst er farin frá sum A&R stjóri hjá Sony. Tey lótu sera væl at demobandinum hjá The Dreams og hildu, at hetta var ein bólkur, sum kundi koma langt.

"Tað er ordiliga gott, at hoyra sovorðið frá einum sovorðnum sum Olivier, tí hann livir av at finna bólkar" sigur Hans Edward. "Tey kallaðu okkum eina kollvelting, tað hoyra vit ikki hvønn dag, og tá tað so kemur frá teimum, so er tað ordiliga kul."



*The Dreams eru ein frálíkur live-bólkur, hósdagin kl. 17.00 verður høvið at uppliva teir live í Tinghúsgarðinum í Havn*

## Fyrstu døgnini

Fyrsti partur av sendingini var um fyrstu døgnini. Man sá demobondini hjá bólkunum, og fyrstu kappingina, har allir bólkarnir skuldu gera sína heilt egnu tolking av Anastacia lagnum "My love is on the line". Hans Edward sigur, at tað altíð er nemt hjá teimum at gera sangir, og hetta var einki undantak. Teir brúktu umleið 10 minuttir, so var tolkingin liðug. Hann sigur, at meðan hinir bólkarnir skeldaðust um hvussu tað skuldi gerast, so kundu The Dreams venja sangin.

Tolkingarnar gjørdust eisini sera blandaðar upplivingar. Anastacia og Olivier søgdu so bólkunum hvat teir áttu at broyta, og hvat var gott. The Dreams fingu at vita, at teir bara skuldu halda áfram við at gera akkurát tað, sum teir gjørdu

## Nógv trýst

Men hóast alt rósið og tey vøkru orðini, so sigur Hans Edward, at tað var øgiliga intenst at standa og bíða eftir avgerðini. Hann sigur, at hann var sannførdur um, at teir ruku heim. MTV dugdi væl at gera tað spennandi, so har var nógv trýst á bólkarnar.

Men tá avtornaði vóru tað týski bólkurin indierokkbólkurin Leo can dive, og hálendski funk-garagerokkbólkurin Zzyke sum vórðu sendir heim. Hans Edward sigur, at hetta vóru júst teir bólkarnir, sum The Dreams høvdu fylgst við fyrstu dagarnar, so tað var eitt sindur keðiligt, at teir skuldu fara so tíðliga, tí teir vóru vorðnir væl við teir.

## Lívið er eitt sindur broytt

The Dreams, er ein bólkur, sum er sprottin úr punkbólkinum Zink. Zink luttók á Prix Føroyum fyri tveimum árum síðan, og hevur síðan givið eina fløgu út. Bólkurin gjørdist ongantíð nakað stórt navn á føroyska tónleikapallinum. Men tá bólkurin varð til The Dreams, og knappiliga vann sær luttøku í eini MTV kapping, gjørdust teir tríggir limirnir kend andlit í Føroyum. Beinleiðis avleiðingin var luttøka á nógvum konsertum og festivalum í summar.

Men sambært Hans Edward fylgir eisini annað við, tað kennist t.d. ordiliga løgið at ganga runt í Havn, smágentir koma yvir og siga hey, og fullir menn vilja práta við teir. Tað byrjaði ordiliga, beint tá fyrstu lýsingarnar fyri A cut vóru á MTV. Men hann heldur tað vera kul.

## MTV konsert í Havn

Í sambandi við, at sendirøðin er byrja á MTV, fer The Dreams at spæla konsert í Tinghúsgarðinum hósdagin klokkan 17.00, her verður ivaleyst høvi at hoyra tolkingina av Anastacia lagnum, og øll hini frálíku løgini hjá punkbólkinum.

## MTV Europe

MTV hevur serstøðir í Svørríki, Danmark, Noregi og Finnlandi, og so vanliga MTV Europe, sum m.a. Televarpið sendir. Skráin er ymisk, á ymsu støðunum, men á MTV Europe, verður sendingin endursend kl. 17.00 mikukvøldið og hóskvøldið, annar partur verður sambært MTV sendur fríggjakvøldið kl. 17.00.

